## 50 ár í Gundadali:

# Frá Esso til effo

føroya orkufelag




*Her er Esso-støðin í Gundadali spildurnýggj. Tann fyrsta servicestøðin í landinum. Ella og Frits Jensen búðu í sethúsunum høgrumegin*

Í ár eru 50 ár liðin síðan fyrsta servicestøðin í Føroyum læt upp í Gundadali í 1959. Í dag er tað føroyska orkufelagið Effo við nýggja handilskonseptinum Fast, sum myndar bygningin.

Søgan um Effo við nýggja handilskonseptinum Fast í Gundadali byrjar við at oljufelagið Esso bygdi eina servicestøð har. Tá støðin varð liðug í 1959, yvirtók danin Frits Jensen, sum tá hevði bilverkstað í Rættará, støðina, og rak hana í mong ár.

Í 1986 fór Knút P. Jacobsen frá sum stjóri á Esso og yvirtók støðina. Knút gjørdi stórar um- og útbyggingar við at vaksa um sølubúðina og byggja vaskihallir uppí bygningin. Tað var um hetta mundið, at norska felagið Statoil yvirtók Dansk Esso, og Esso í Føroyum bleiv til Statoil. Tá Knút lat støðina frá sær yvirtók Statoil støðina í Gundadali.

Í sambandi við at Statoil herfyri skifti identitet og eitur nú Effo, eru stórar umbyggingar farnar fram, og virksemið er býtt upp í tvey – orka og handilsvørur.

**mg**




*Effo við nýggja handilskonseptinum Fast, sum myndar bygningin í dag. Sum tað sæst, er skrivstovubygningurin undir umbygging*



*Ella og Frits Jensen framman fyri verkstaðin í Rættará umleið 1950. Ella andaðist í 1985, 73 ára gomul, og Frits í 1990, 72 ára gamal*



*Anfríði Dam Jacobsen til arbeiðis á Essostøðini í Gundadali í 60-unum*

Mynd: Eirikur Ó. Simonsen



*Frits Jensen fekk nógvar blómuheilsanir tann dagin støðin læt upp í 1959*




*Hans Waag, søluleiðari, og Niels Juel Nattestad, stjóri í Effo*



*Ein gulur Bedford lastbilur og ein reyður Rambler Classic árgang 1962. Leggið til merkis svørtu barakkina frá krígsárunum*

Mynd: Eirikur Ó. Simonsen